# Keypa nýggjar tyrlur

Grønlendska flogfelagið Air Greenland hevur gjørt av at keypa fimm nýggjar tyrlur til sína flúgving. Tríggjar tær fyrstu koma um tvey ár og tær seinastu í 2012. Tyrlurnar eru av slagnum AW139, sum bretska-italska verksmiðjan Agusta Westland ger, og tær koma ístaðin fyri verandi tyrlurnar, sum Air Greenland nú hevur av sløgunum Bell 222 og S-61. Air Greenland roknar við at brúka 400 mió. krónur til tyrludeildina tey næstu árini.



# Bátarnir takast uppaftur

Sjónin var øgiliga sum møtti bátaeigarunum í Skálavík eftir herviligu ódnina í farnu viku. Allir høvdu teir fingið skaða ella vóru soknir. Sambært heimasíðuni bkv.fo skilst, at í góðveðrinum í morgun var farið undir at taka allar hesar bátarnar uppaftur.



*Hans Pauli Olsen er listafólk við stóra L og báðum beinum á jørðini*

í roynd og veru er. Og tó ikki! Tí so við og við verða fleiri listarlig ástøði og hugleiðingar borin fram, ið hava lyndi til at mótsiga sær sjálvum. Hetta ger bert filmin meir áhugverdan. Og hesar mótsøgnir játtar Hans Pauli seg eisini til, tí listin er ikki nakar Sannleiki men heldur á tremur við mótsøgnum. Sum dømi kanst tú bert nýta Hans Paulasa egna ástøði, har hann tilvitað steðgar at evna sína standmynd til, áðrenn hon líkist veruleikanum, tí so líkist hon meira veruleikanum, enn veruleikin sjálvur.

## Manglandi fokus

Hetta er alt sera áhugavert og spennandi. Men til tíðir kennist tað eins og tú ikki ordiliga veitst, hvørjum tú fylgir við í. Krossklippingin av familjuni, modellinum og arbeiðsgongdini ørkymlar til tíðir meira, enn hon vegleiður hyggjaran. Hetta er synd, tí tað, sum gongur fyri seg á skýggjanum, er ómetaliga áhugavert. Tað er heilt týðiliga eitt heildarportret av Hans Paula, sum Katrin er ígongd við, og ikki bert eitt portrett av Hans Paula sum listamanni. Men hetta riggar ikki heilt. Ynski um at fáa familjuna uppí myndina av Hans Paula verður fangað ímillum ov lítið og ov nógv. Ov nógv, tá man spentur fylgir Hans Paulasa strevan eftir forminum og hugtakinum, ið hansara standmynd skal hava. Og ov lítið, tá tú týðiliga saknar eina heildarmynd av familjuni í endanum av filminum. Tað virkar, sum um Katrin Ottarsdóttir hevur roynt at fáa alt við, men í

*Tað er ein sonn fragd at hoyra og síggja Hans Paula Olsen forklára sítt meginparadoks sum listamaður*

somu roynd tíverri missir heildina. Tann, til tíðir, vánaliga ljóð- og myndagóðskan ger tað eisini torført at fylgja við. Hetta er spell, tí kamera-arbeiðið hjá Katrin er sera gott, serliga tá hon er saman við Hans Paula úti í framsýningarhøllunum. Her vísir hon veruliga, hvat hon dugir.

## Ov fitt

Ein onnur avleiðing av vantandi fokuseringini er longdin á filminum. Spælitíðin er 85 minuttir, og kundi hetta verið væl styttri. Tí, sum filmurin heldur fram, verður tað meira ein staðfesting av tí sama, enn ein nýggj útvikling, ið verður greinað. Her vantar filmurin eisini eitt sindur meira kant! Okkurt, sum rykkir í teg, uttan at tú beinanvegin er klárur yvir, hvat tað er. Nakað, sum ikki verður borðreitt beint framman fyri nøsini á tær, men sum liggur fjalt undir yvirflatuni og materialiserar seg til síðst. Tíverri er ynskið um at lýsa tann "nakna" veruleikan (at vera ein fluga á vegginum), ikki nóg mikið til at leita longur niður í veruleikan og avdúka hann í hesum førinum. Filmurin er heilt einfalt ov fittur við síni evni. Á sama hátt, sum Hans Pauli sjálvur ígjøgnum allan filmin kritiskt fyriheldur seg til sínar standmyndir, so saknaði undirritaði okkurt rátt element í filminum, har tú verður kroystur at fyrihalda teg meira kritiskt til tað, tú hyggur at.

## Oddafólk

Alt hetta er tó lítið, í mun til tað ótrúliga arbeiði og avrik, ið "Eingin kann gera tað perfekta" er. Serliga, tá tú hugsar um umstøðurnar. Einsamøll og bert við einum filmstóli hevur Katrin fylgt Hans Paula í næstan eitt heilt ár, og hevur hegnisliga klippt (sæð burtur frá omanfyri nevnda kritikki) og lagt hetta til rættis, so vit øll sleppa at luttaka í kreativu arbeiðsgongdini hjá Hans Paula Olsen. Hetta er eitt sera áhugavert og til tíðir undirhaldandi portræt av einum listarfólki, ið eg fegin mæli fólki til at fara at hyggja eftir. Við "Eingin kann gera tað perfekta" markerar Katrin Ottardóttir seg enn einaferð sum eitt av oddafólkunum innan føroyska filmsheimin.



*Við einum fimstóli á økslini hevur Katrin Ottarsdóttir fylgt myndahøggaranum, Hans Paula Olsen, í út við eitt ár í nýggja filminum "Eingin kann gera tað perfekta"*